Todi bestur í Danmark

Ongantíð áður hevur føroyski landsliðsmaðurin í FCK víst so støðug avrik, sum hann hevur sýnt fram ímóti vetrarsteðginum í ár

SUPERLIGA
Jóannes Hansen

Todi Jónsson er ein tann besta fótbóltsspælarin í donsku superliguni. Í práti við danskar fótbóltskennarar hevur aftur og aftur verið undirstrikað, at eingin ivi hevur verið um, at evnini hjá føroyinginum í FCK vóru sum hjá fáum øðrum.

Spurningurin hevur heldur snúð seg um, at avrikini hava ikki verið nóg støðug. Todi hevur verið ofta skaddur, og viðhvørt hevur tað ikki gingið, sum Todi, FCK og fótbóltshugaðir føroyingar høvdu vónað.

Men síðani Roy Hodgson í summar fekk ábyrgdina av FCK liðnum, síðani Jacob Laursen fór at tetta í miðverjuni, og síðani norski Ståle Solbakken fekk taktstokkin á miðvøllinum, hevur tað gingið sum eftir ánni hjá Toda. Ferð eftir ferð hevur hann verið mettur ímillum teir bestu á FCK liðnum.

Hann hevur verið á ytsta miðvallarplássinum í vinstru, har tað hevur tókst sum at skera í fløtt smør, tá hann er farin framvið verjumonnunum á mótstøðuliðnum. Todi hevur lagt nógvar neyvar og góðar sendingar innfyri. Summar hava borið mál við sær, men mangar hava ikki fingið ta viðferð, sum tær høvdu uppiborið. Tað hevur verið ein veikleiki hjá FCK – og tað er høvuðsorsøkin til, at teir ikki eru fremstir í superliguni – at fremstu menninir ikki hava verið nóg avgjørdir frammanfyri málinum.

Hóast Todi Jónsson hevur verið miðvallari, so var hann fram til nú sunnudagin toppskjútti í FCK. Undan dystinum ímóti Haderslev hevði Todi skorað fimm mál. Tí kom tað ikki óvart á – sjálvt um FCK hevur fleiri álopsspælarar, t. d. svenska Patrick Simpson og norska Harald Brattbakk – at Roy Hodgson undan síðsta dystinum undan fyri vetrarsteðgin gjørdi av, at Todi skuldi vera í álopinum. Makkari hjá honum sunnudagin var Harald Brattbakk.

Uppvísningur

FCK vann 4-0, og í donsku miðlunum var eingin ivi um, hvør var stóri maðurin á FCK liðnum. Todi Jónsson kom á vikuliðið hjá TV3, og í bløðunum í gjár var hann tann einasti av teimum, sum vóru á vøllinum í Parkini sunnudagin, sum fekk eitt tíggju tal fyri sítt avrik.

Orsøkin var eyðsýnd. Í 7. minutti setti Todi hol á málskjótingina. Tveir metrar uttanfyri brotsteigin fekk hann fatur á einum tilvildarligum bólti, Todi svingaði vinstrabeinið, og bólturin streyk eftir mjúka danska heystargrasinum og í meskarnar.

Tá átjan minuttir vóru farnir, var støðan 3-0. Harald Brattbakk hevði víst, at hann var rætta valið til plássið undir liðini á Toda. Fyrst stútaði hann eitt innlegg í málið (tað var í 11. minutti), og í 18. minutti smekkaði hann í kassan, eftir at Ståle Solbakken, sum sunnudagin ikki var so eyðsýndur, sum hann plagar at vera, hevði taklað bóltin frá einum mótstøðumanni.

FCK kundi havt fingið uppaftur fleiri mál fyrstu løtuna, men teir misnýttu stórar møguleikar. Jacob Laursen fekk tann største, men hann sendi brotsspark skeivu megin stólparótina. Brotssparkið varð dømt, tí dómarin metti, at Thomas Thorninger var skumpaður í ryggin. Tað vóru sera fá í Parkini, sum tóku undir við sjónarmiðnum hjá dómaranum. Thorninger spældi í miðvallarplássinum í vinstru, sum Todi plagar at spæla í. Suðurafrikanski Suma var ytstur á miðvøllinum í høgru.

Prikkurin

13.187 áskoðarar vóru í Parkini. Tað gingu teir høgt uppí í Danmark. Hetta var 11. ferðin á rað, at FCK á heimavølli spældi fyri fleiri enn tíggju túsund áskoðarum, og tað siga teir er nýtt met.

Lagið var sjálvandi í toppi á nógv teimum flestu. FCK hevði ikki vunnið fimm tær síðstu ferðirnar, men hesa ferð eydnaðist tað væl og virðiliga, og fjórða og síðsa málið, sum kom í 64. minutti, var toppurin á kransakøkuni. Todi Jónsson spenti avstað ímóti Haderslev málinum. Hann hevði ivaleyst megnað at sneitt framvið málverjanum, men ósjálvsøkið – og tað løgdu teir í sjálvsókna danska fótbóltsheiminum væl til merkis – valdi Todi at leggja bóltin fyri føturnar á Harald Brattbakk, sum kom inn á strikuna við honum, áðrenn hann slepti honum í málið.

Við ósjálvsóknu sendingini syrgdi Todi fyri, at norski álopsmaðurin hjá FCK heldur vetrarfrí sum toppskjútti í felagnum. Harald Brattbakk hevur skorað sjey mál, og Todi Jónsson hevur skorað seks mál.

Í annaðkvøld skal FCK spæla ein venjingardyst ímóti norska Rosenborg. So verða ikki fleiri dystir á skránni í hesum árinum. FCK spælararnir skulu venja alla hesa vikuna og kanska eitt sindur afturat. Ivaleyst kemur vetrarsteðgurin væl við, men soleiðis sum Todi Jónsson hevur spælt í heyst, so er einki at ivast í, at hann væl kundi hildið á í nógvar vikur afturat.

Einki er at siga til, um lagið á Toda var gott mánadagin. Donsku miðlarnir tykjast samdir um, at hann í løtuni millum teir allarbestu í Danmark

Johan og Óli spæla ikki meiri í ár

Burtursæð frá Toda Jónsson var eingin føroyingur í dysti í superliguni sunnudagin. Í gjárkvøldið høvdu Jákup Mikkelsen og teir møguleika at lyfta seg upp um niðurflytingarstrikuna

SUPERLIGA
Jóannes Hansen

Johan B. Hansen var í hópinum hjá OB, tá teir í Odense høvdu vitjan av AaB. Men føroyski landsliðsmaðurin kom ikki á vøllin. Óli Johannesen var ikki í hópinum hjá AGF, sum frammanfyri seks túsund áskoðarum spældi ímóti grannunum úr Silkeborg. Nú er síðsti møguleikin hjá Óla Johannesen at spæla við AGF farin. Superligan fór sunnudagin í vetrarfrí, og tá fótbólturin aftur fer á rull í Danmark, fer Óli Johannesen at spæla við Hvidovre í næstbestu deildini.

Ein dystur varð ikki spældur fyrrenn í gjárkvøldið. Tá høvdu Jákup Mikkelsen og hinir í Herfølge vitjan av oddaliðnum í superliguni, Brøndby. Um Herfølge vann ímóti Brøndby, so fóru teir upp um niðurflytingarstrikuna, og so datt AB niður um strikuna.

AB, sum í summar varð mett at hava besta miðvøllin í superliguni, tapti sunnudagin 2-1 í Lyngby. Dysturin stóð í skugganum av FCK og Parkini. Bara 2.327 áskoðarar møttu í Lyngby. Úrslitið hevur við sær, at Lyngby heldur jólafrí á fjórða plássinum.

OB lá undir

OB tapti 3–2 á heimavølli ímóti AaB. Merkisvert fyri OB var tað, at Per Pedersen, sum er giftur við fyrrverandi danska landsliðsspælaranum í hondbólti, Anju Byrial Hansen (hon er systir Johan B. Hansen) skoraði. Per Pedersen hevur verið illa plágaður av skaðum. Hann varð skiftur inn í 2. hálvleiki, og fýra minuttir undan leikloki sendi hann hornaspark beinleiðis í málið.

Lagið var gott í Odense. Teir høvdu verið aftanfyri 2-0, og nú sá út til, at teir skuldu fáa eitt stig burturúr. Men soleiðis sá tað bara út í eina lítla løtu. Í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, skoraði Søren Frederiksen sigursmálið fyri AaB. Søren Frederiksen hevði frammanundan lagt AaB framum 2-0. Dysturin var merkisverdur fyri AaB og Søren Frederiksen. Á nýggjárinum flytir álopsmaðurin, sum higartil í hesum kappingarárinum hevur skorað tíggju mál, til Viborg, har hann er uppvaksin.

Sólarglottarnir

Viborg var í Ikast og spældi ímóti FC Midtjyllandi. Í Danmark eru fjølmiðlarnir á einum máli um, at tað júst eru hesi bæði liðini, sum hava staðið fyri tí mest positiva higartil í hesum kappingarárinum.

Undirhaldsvirðið var sera høgt í Ikast. Viborg var á odda 1-0 og 2-0, áðrenn heimaliðið svaraði aftur og legði seg framum 3-2. Í 2. hálvleiki svaraði Viborg aftur. Teir javnaði til 3-3, og síðstu løtuna skoraðu teir tvey mál afturat. Tað verður mett at vera ikki lítið sannlíkt, at tað kann eydnast hjá Viborg at vinna fyrsta DM heitið nakrantíð. Viborg heldur jólafrí á triðja plássi. FCM hevur verið á øðrum plássi, men tapið hesa ferð hevði við sær, at teir halda frí á sætta plássinum. FCK er á fimta plássi.

Hvalvíkingar á odda í 1. deild

Halvíkingar vunnu torføra dystin móit klaksvíkingum, og hava nú lagt seg einsamallar á odda í fremstu deildini eftir tey bæ›i fyrstu umførini

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Eftir tveimum umførum hava hvalvíkingar, TFS, lagt seg einsamallir á odda. Teir vunnu leygardagin trygt 3-1 ímóti einum skerdum klaksvíksli›i. Rani Nolsøe telva›i ikki vi› klaksvíkingum.

Vestmenningar og havnarmenn deildu stigini í Vestmanna. Vestmenningar, sum eisini kunnu metast sum favorittar í ár eftir at hava ogna› sær Torbjørn Thomsen, kunnu ikki vera heilt nøgdir vi› hetta úrslit. 2-2 úrsliti› sta›festir enn einafer› hvussu jøvn kappingin ivaleys ver›ur.

Kollfir›ingar buka›u sandavágsmenn heili 3,5 - 0,5.

Í fjør var kappingin sera jøvn, men bert tvey li› kappa›ust tá um fremsta plássi, nevnliga havnarmenn og klaksvíkingar, men í ár ver›a ta› helst fleiri um strí›i› um gullkrónurnar.

VT - HT	2-2
TFS - KTF	3-1
ST - KT	0,5-3,5

Stø›an í fremstu talvdeildini framgongur a›ra sta›ni á sí›uni

TFS	5 stig
VT	4
HT	4
KT	3,5 (bert leikt ein dyst)
ST	2,5
KTF	1 (bert leikt ein dyst)

Stórsigur til Talvfelagi› Føroyar

Føroyska talvfelagi› í Keypmannahavn sum telvar í tri›ju deild, telva›u útsettan dyst í vikuskiftinum. Telva› var› ímóti einum li›i í veikara enda, i› kallast FHS, Fredensborg-Hummlebæk Skakklub. Kravi› var stórsigur til okkara menn.

Eins og í seinastu viku vunnu føroyingar stórsigur, nevnliga 6-2. Flóvin var aftur at síggja á li›num, hann sat á tri›ja bor›i.

Einki talv frá føroyskari sí›u bleiv tapt. f‡ra blivu vunnin og f‡ra javnleikir. Teir sum vunnu vór›u Heini Olsen, Flóvin Tór Næs, Heini Danielsen og undirrita›i, me›an John Arni Nilssen, Ey›un Nolsøe, Bogi Ziska og Terji Petersen leiktu javnleik.

Tveir 6-2 sigrar hava vi›ført at føroyska li›i liggur á ø›rum plássi, tvey stig aftanfyri Ballerup, sum li›i møtir næstu fer›.

Flogbóltur

Meistaradeild kvinnur:

Stø›an Li›	Dystir leiktir	vunnir	taptir	Sett vunnin	tapt	munur	* Stig
Dráttur	7	6	1	20	5	15	12
Mjølnir	7	6	1	19	6	13	12
Fleyr	7	4	3	13	12	1	8
ÍF	7	3	4	10	14	-4	6
TB	7	2	5	12	16	-4	4
Fossánes	7	0	7	0	21	-21	0

Meistaradeild menn:

Stø›an Li›	Dystir leiktir	vunnir	taptir	Sett vunnin	tapt	munur	* Stig
Mjølnir	6	5	1	17	7	10	10
ÍF	5	4	1	13	5	8	8
Fram	6	3	3	13	12	1	6
Fleyr	5	2	3	8	11	-3	4
SÍ	6	0	6	2	18	-16	0

Stø›an, danska superligan

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Brøndby	17	10 - 3 - 4	44	20	24	33
2	Silkeborg	18	8 - 8 - 2	27	23	4	32
3	Viborg	18	9 - 4 - 5	31	18	13	31
4	Lyngby	18	10 - 1 - 7	30	32	-2	31
5	FCK	18	8 - 6 - 4	30	16	14	30
6	FCM	18	8 - 6 - 4	31	25	6	30
7	OB	18	8 - 2 - 8	29	23	6	26
8	AaB	18	7 - 4 - 7	28	30	-2	25
9	AGF	18	6 - 2 - 10	27	36	-9	20
10	AB	18	3 - 7 - 8	24	29	-5	16
11	Herfølge	17	3 - 5 - 9	20	35	-15	14
12	Haderslev	18	1 - 4 - 13	18	52	-34	7

Li›kapping, talv

1. Deild

ST	**KT0.**	**5–3.5**
Torkil Nielsen	Henrik Danielsen	0–1
Bernhard Augustinussen	Hans K. Simonsen	0 - 1
Gutti Petersen	Grettir Djurhuus	0 - 1
Sonni Nielsen	Hanus Joensen	0.5–0.5
VT	**HT**	**2–2**
IM John Rødgaard	Haldur S. Johansen	1–0
Torbjørn Thomsen	Herluf Hansen	1–0
Kári Durhuus	Suni Merkistein	0–1
Jón Mikkelsen	Olaf Berg	0–1
TFS	**KTF**	**3–1**
Martin Brekká	Tummas M. Anthoniussen	0.5–0.5
Finnbjørn Zachariasen	Petur Hans Poulsen	1–0
Sámal Christiansen	Ingolf Gaard	1–0
Gunnar Joensen	Rúni Dragaberg	0.5–0.5

Stø›an eftir 2. umfar

1. TFS, Hvalvík	5
2. VT, Vestmanna	4
3. HT, Tórshavn	4
4. KT, Kollafjør›ur	3,5
5. ST, Sandavágur	2,5
6. KTF, Klaksvik	1

2. Deild

HT 2	**RT**	**3–1**
Jóhan Gaard	Ólavur Simonsen	0.5–0.5
Michael Jensen	Brandur K. Jacobsen	0.5–0.5
Jógvan Naes	Ey›un Lamhauge	1–0
Jóannes Guttesen	Jón Hammer	1–0
TT	**HT 3**	**3–1**
Helgi Joensen	Poul Poulsen	0.5–0.5
Wensil Højgaard	Jóhan E. Hansen	1–0
Øssur Hansen	Suni Jacobsen	0.5–0.5
Jógvan M. Olsen	Jón Andreasen	1–0
KTF 2	**GT**	**0.5–3.5**
Óli Joensen	John Joensen	0–1
Esbern Christiansen	Reinhold Isaksen	0.5–0.5
Rógvi Dragaberg	Jákup F. Joensen	0–1
-	Kári Mørkøre	0–1

Stø›an eftir 2. Umfar

1. HT 2, Tórhavn	6
2. GT, Gøta	4,5
3. RT, Runavík	4
4. TT, Toftir	4
5. KTF 2,Klaksvik	3,5
6. HT 3,Tórshavn	2

3. Deild

VT 3	**Rókur**	**0–4**
Olaf í Gar›astovu	Árni M. Dam	0–1
Jóhannus Johannesen	Karl M. S. Jensen	0–1
John Martin Andreasen	Bergur Johannesen	0–1
Magni Johannesen	Hans E. Jensen	0–1
HT 4	**KT 2**	**3–1**
Sigur› B. Justinussen	Hans Jacob Petersen	1–0
Øssur Joensen	Karl Louis Johansen	0–1
Jákup A. Jensen	Ronny í Lon	1–0
Frants Eliasen	Hans Martin Andreasen	1 - 0
KTF 3	**VT 2**	**1.5-2.5**
Vagn Heldarskar›	Jákup á Rógvi Andreasen	1–0
Jan Simonsen	Joen Pauli Johannesen	0.5–0.5
Jógvan Ravnsfjall	Niels O. Durhuus	0–1
Rani Tómasson	Hanus I. Hansen	0–1

Stø›an eftir 2. umfar

1. VT 2, Vestmanna	6,5
2. HT 4, Tórshavn	6
3. KT 2, Kollafjør›ur	4,5
4. Rókur, Oyri	4,5
5. KTF 3, Klaksvík	2,5
6. VT 3, Vestmanna	0